# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Øll valevnini virka fyri góðum málum og góðum hugskotum og tæna landi okkara við sóma og æru*

*(Barrack Obama)*

# Kvinnurnar hjálptu Hillary

**Í Iowa sviku kvinnurnar Hillary Clinton, men í New Hampshire fekk hon tær í part við sær. Tí vann hon**



*Hillary Clinton var sjónliga ovurfegin um sigurin í New Hampshire*

*(Mynd: AP)*

Tað undraði mong, at Barrack Obama fekk atkvøðurnar frá teimum flestu kvinnunum í Iowa í síðstu viku. Men í New Hampshire valdu kvinurnar ta einastu kvinnuna ímillum valevnini.

57 prosent av teimum demokratisku atkvøðunum í New Hampshire vóru frá kvinnum, og av teimum fekk Hillary Clinton 46 prosent, meðan Barrack Obama fekk 34 prosent. Tað endaliga úrslitið við 39 prosentum til Hillary Clinton og 36 til Barrack Obama sigur, at tað vóru kvinnurnar, sum gjørdu mun og avgjørdu valið hesaferð.

Fekk Hillary Clinton tær flestu demokratisku kvinnurnar í sín part, so var tað Obama, sum fór við atkvøðunum frá teimum sokallaðu óheftu veljarunum. Í New Hampshire kunnu fólk, sum hvørki eru skrásett sum demokratar ella republikanarar, velja tað valevnið, sum teimum dámar best.

Í New Hampshire eru umleið 40 prosent av veljarunum óheftir, og tølini vísa, at Barrack Obama fór við 41 prosentum av teimum óheftu, sum vóru á vali, meðan Hillary Clinton fekk stuðul frá 31 prosentum.

### Ynskti Hillary tillukku

Politisku eygleiðarar siga, at úrslitið í New Hampshire var uttan iva eitt vónbrot fyri Barrack Obama, tí líka til tað síðsta bendu allar meiningakanningar á, at hann fór at vinna.

Í nátt ynskti hann Hillary Clinton tillukku við sigrinum og vísti stórsinni við at biðja sínar stuðlar heilsa henni við lógvabrestum.

-Vit vita, at hetta verður strævið. Men tit mugu minnast til, at sama hvørjum forðingum vit møta, so kann einki forða megini frá øllum teimum milliónunum, sum vilja hava eina broyting, segði Obama og varð stórliga fagnaður.

## STUTT SAGT

### Leysur eftir 21 ár í fongsli

Tannh 43 ára gamli skotin Kenny Richey er sloppin úr einum fongsli í Ohio í USA, har hann hevur verið tey seinastu 21 árini, eftir at hann bleiv dømdur fyri at hava sett eld á eini hús við tí úrsliti, at ein tvey ára gomul smágenta brann inni. Hann hevur alla tíðina noktað seg sekan, men bleiv kortini dømdur til deyða í 1986, og síðani 1987 hevur hann verið á teirri sokallaðu deyðagongini í fongslinum. Nú hevur hann gjørt avtalu við ákæruvaldið um at sleppa úr fongslinum, aftur fyri at hann játtar seg sekan. Hevði hann gjørt tað í 1986, hevði hann helst fingið 11 ára fongsul fyri manndráp, sigur Sky News. Kerry Richey, sum nú fer aftur til Skotlands, heldur uppá, at minst 30 fangar í Ohio eru dømdir til deyða, sjálvt um teir eru ósekir.

### Suharto illa sjúkur

Fyrrverandi indonesiski forsetin Suharto er álvarsliga sjúkur. Í síðstu viku fekk hann trupulleikar við hjartanum og ov lágum blóðtrýsti, og hann varð í skundi fluttur á eitt sjúkrahús í høvuðsstaðnum Jakarta. Suharto, sum nú er 83 ára gamal, stýrdi Indonesia við harðari hond í samfull 32 ár. Tað hevur leingi ljóðað, at hann og skyldfólk hansara rændu fleiri milliardir dollarar úr indonesiska ríkiskassanum tey árini, hann var forseti. Suharto hevur alla tíðina noktað seg sekan.

### Forsetin vann

Almenna valnevndin í Georgia váttar nú, at Mikhail Saakasjvili varð afturvaldur til forseta á valinum seinasta leygardag. Sambært nevndini fekk hann 52,21 prosent av atkvøðunum og sostatt meiri enn tey neyðugu 50 prosentini. Á øðrum plássi var vinnulívsmaðurin Levan Gasjesjiladse, sum fekk 25,26 prosent. Enn eru 1,2 prosent av atkvøðunum eftir at kanna, men tær kunnu ikki broyta úrslitið, sigur valnevndin.

## FAKTA

**Úrslitið í New Hampshire**

**Demokratarnir:**
Hillary Clinton 39%
Barack Obama 36%
John Edwards 17%
Bill Richardson 5%
Dennis Kucinich 1%

**Republikanararnir:**
John McCain 37%
Mitt Romney 32%
Mike Huckabee 11%
Rudy Giuliani 9%
Ron Paul 8%
Fred Thompson 1%

# McCain besta boðið

**Tann 71 ára gamli John McCain vann tryggan sigur í New Hampshire og er nú besta boðið hjá republikanarunum**

- Vit hava víst amerikanska fólkinum, hvussu ein kann venda gongdini og koma afturíaftur, segði John McCain, tá hann í nátt takkaði sínum stuðlum í New Hampshire.

Við 37 prosentum av teimum republikonsku atkvøðunum vann hann ein rímiliga tryggan sigur á avbjóðaranum Mitt Romney, sum fekk 32 prosent. Mike Huckabee, sum vann í Iowa í síðstu viku, fekk 11 prosent hesaferð.

Politiskir eygleiðarar í USA siga, at valsigurin hjá John McCain í New Hampshire var ein fráboðan um, at hann er tað besta boðið upp á eitt republikanskt forsetavalevni. Valið vísti eisini, at hann er maðurin, sum kann koma afturíaftur.

- Øll, sum hava nakra ávirkan, søgdu, at vit høvdu tapt. Men eg segði teimum, at eg fór til New Hampshire, tí veljararnir har góðtaka ikki, at nakar tekur støðu fyri teir. Tá tey so spurdu meg, hvussu eg ætlaði at bera meg at, svaraði eg, at eg ætlaði at siga veljarunum sannleikan, segði John McCain í sínari takkarrøðu.



*John McCain og konan Cindy*